KÍ-GÍ:

# Lasarettið í Gøtu er fult

**Langi listin við skaddum leikarum gevur GÍ venjaranum Krzystof Popczynski mikið høvuðbrýggj. KÍ er hinvegin væl fyri, men hevur tó teir royndar leikarar uttanfyri**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Í dystinum móti B36 í Havn sunnudagin misti GÍ tveir leikarar fyri steðgin, og frammanundan stóð illa til.

Símun Louis Jacobsen hevur fingið ein álvarsaman knæskaða, og landskappingin er fyri hansara viðkomandi væntandi av á hesum sinni, frætta vit úr Gøtu. Símun Samuelsen hevði trupulleikar við andadráttinum undir dystinum móti B36, og hann er sendur suður til Vágs í summarfrí.

Eisini er sera ivasamt, um venjarin Krzystof Popczynski verður í álopinum ímóti KÍ. Hann varð borin av vøllinum á børu ímóti B36, men hann kom tó innaftur á vøllin, tí hann hevði brúkt allar tríggjar útskiftingarnar. Hans Pauli Petersen er somuleiðis ivasamur.

Sagt verður úr Gøtu, at einir 8 til 9 leikarar eru uttanfyri við álvarsomum og minni álvarsomum skaðum.

Hinvegin verður Súni Olsen við aftur, eftir at hann hevur sitið leikbannið av sær. Bartal Eliasen verður eisini við frá byrjan hesuferð.

Summarsteðgurin kemur tískil sera væl við hjá GÍ, nú liðið skal fyrireika seg til steypafinaluna á ólavsøku.

Hjá KÍ stendur hinvegin nógv betur til. Bert John Ryan og Allan Joensen eru ikki tøkir hjá venjaranum.

John Ryan fór av vøllinum eftir bert átjan minuttir ímóti HB við einum skaða í knænum. Allan Joensen hevur trupulleikar við hælinum, og tað er sami skaði, sum hevur plágað hann í fleiri ár. KÍ vann fyrra dystin 1-0.

B68-EB/Streymur:

# Magni við aftur

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Hvørki B68 ella EB/-Streymur hava stórvegis mannfall undan dystinum teirra millum. Hjá EB/-Streymi er Magni á Lakjuni tøkur aftur eftir leikbann, men Andrzej Pacek er langtíðarskaddur.

Hjá B68 er einki leikbann, og annars er bert talan um smáskaðar hjá nøkrum leikarum. Venjararnir báðir hava tí stórt sæð sterkastu manning at taka av.

Fyrri dysturin millum EB/Streym og B68 endaði við javnleiki 2-2.0

# Seks føroyingar til Politiken Cup

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Árliga Politiken Cup í Keypmannahavn, verður leikt í døgunum 14-25. juli. Umleið 250 luttakarar hava boðað frá luttøku, harav seks føroyingar. Hesir eru John Arni Nielsen, Flóvin Tór Næs, Hans Kristian Simonsen, Olaf Berg, Herluf Hansen og Jákup á Rógvu Andreasen.

Tað varð í somu kapping í fjør, at John Arni vann sær sín fyrsta IM-norm. Vónandi endurtekur hann bragdið. Flóvin fer normsvangur eftir sínum næsta IM-normi, og spennandi verður eisini at fylgja gongdini hjá Hans Kristiani og Olaf.

Herluf er gamal kenningur í Politiken Cup, meðan vestmenningurin Jákup roynir seg á fyrsta sinni í kapping uttanlanda.

Fylgið við á http://www.politikencup.dk.

| Dato: | Lið: | Dómari: |
|---|---|---|
| 0907 | FS Vágar - HB | Niklas á Líðarenda |
| 0907 | KÍ - GÍ | Birgir Sondum |
| 0907 | B36 - VB | Dagfinn Olsen |
| 0907 | B68 - EB/Streymur | Páll Augustinussen |

FS Vágar - HB:

# Eiga enn fyrsta heimasigurin til góðar

**FS Vágar er væl fyri og hevur helst allar sínar leikarar tøkar, men meistararnir úr HB hava minst fimm fastar leikarar sitandi uttanfyri**



*Jens Erik Rasmussen, leikandi venjari, brendi eitt brotsspark í seinasta dystinum ímóti NSÍ, og FS Vágar hevur enn ikki vunnið á heimavølli. Møguliga fer tað at eydnast ímóti einum skerdum HB-liði*

*Savnsmynd*

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Tað hevur verið stórt mannfall í HB í ár, og undan hesum umfarinum er heldur einki undantak. So hvørt sum leikarar eru blivnir klárir aftur, hava nýggir skaðar stungið seg upp.

Bárður Johannesen fekk ein knæskaða ímóti B36, og hann var ikki við í Klaksvík. Enn er ikki greitt, um meniskurin er farin, og um málverjin skal leggjast undir skurð í knænum. Hann verður í øllum førum ikki tøkur í kvøld.

Andrew av Fløtum var heldur ikki við í Klaksvík vegna ein knæskaða, og hann verður heldur ikki við í Vágunum. Kári Nielsen breyt beinið fyri nøkrum vikum síðani, og sleppur væntandi ikki at spæla fyrr enn eftir ólavsøku.

Venjarin Frank Skytte upplýsir, at hann í havt millum tveir og fimm leikarar sitandi uttanfyri við skaða til hvønn dyst í ár. Hann leggur hinvegin dent á, at lítil nytta er í at hugsa um teir skaddu leikararnar.

Hinvegin spældi Jan Dam sín fyrsta dyst í 2-1 sigrinum í Klaksvík. Hann er sera virðismikil spælari, tá liðið er undir trýsti, og hann byrjar væntandi inni ímóti FS Vágum.

Miðvallarin Nicu Dogaru er eisini á veg innaftur í hitan eftir skaða, men hann verður neyvan við frá byrjan í Vágunum. Bergleif Sólsker er heldur ikki tøkur, tí hann er farin aftur til B71.

### Tvey leikbann

Teir báðir donsku leikararnir hava báðir leikbann í kvøld. Miðvallarin Martin Christensen hevur savnað sær trý gul kort, og framherjin Carsten From fekk beinleiðis reytt kort ímóti KÍ. Stórur saknur verður óivað í teimum báðum, og Frank Skytte skal nú finna nýggjar leikarar at seta inn.

Ein møguleiki er at seta Jan Dam inn í miðverjuna, og síðani flyta Símun Eliasen fram á tann defensiva miðvøllin, har hann áður hevur spælt.

HB-leikararnir fáa onga summarfrítíð í ár. Næsta mikudag skulu teir í eldin ímóti litaviska liðnum FBK Kaunas, og eina viku seinni skulu teir spæla á útivølli.

### FS Vágar væl fyri

Heimaliðið FS Vágar er hinvegin væl fyri. Einki leikbann er, og tann einasti leikarin, sum er ivasamur, er Ari Thomassen. Verjuleikarin fór út við skaða ímóti NSÍ, og tí er óvist, um hann verður við í kvøld.

FS Vágar hevur enn ikki vunnið nakran dyst á heimavølli, og hevur bert fingið eitt stig, tá spælt hevur verið í Vágunum. Tað var ímóti EB/Streymi. Liðið er eisini í einum aldudali beint nú, og hevur einki stig fingið í trimum teimum seinastu dystunum.

Sigrarnir hjá FS Vágum eru heldur óvæntað fingnir til høldar á útivølli ímóti VB og B68. Fyrri dysturin millum HB og FS Vágar endaði við 3-1 sigri til havnarfelagið.

Fleiri leikarar hjá FS Vágum hava áður spælt við HB, og eitt nú Jóhannis Joensen hevur vunnið tvey meistaraheiti við havnarliðnum. Jens Erik Rasmussen, Ari Thomassen og Jógvan Hendrik Samuelsen hava allir roynt seg í HB í styttri ella longri tíðarskeið

B36-VB:

# Heimalið í stórformi møtir útiliði í aldudali

**VB venjarin hevur allar mans tøkar til dystin móti oddaliðnum, og B36 hevur somu manning sum í seinasta dysti**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Hópurin hjá VB er fullmannað undan dystinum ímóti B36 í kvøld. Mortan úr Hørg og Predrag Zivkovic sótu báðir uttanfyri við leikbanni í 2-0 tapinum móti B68, men teir eru við aftur ímóti B36.

Milan Kulic kom ikki á vøllin fyrr enn seinastu tíggju minuttirnar, tí venjarin valdi at spara tann sterka miðvallaran, men hann er nú klárur aftur.

Ion Geolgau, venjari hjá B36, hevur teir somu menninar tøkar hesuferð sum síðst. Niels Joensen og málverjin René Tórgarð eru framvegis skaddir. Tróndur Vatnhamar hevur tó staðið seg væl, nú hann hevur staðið millum stólparnar.

Bárður Mortansson er farin at spæla aftur eftir skurðviðgerð í knænum, men hann er ikki nóg væl fyri, til at vera millum teir fyrstu ellivu enn.

**Støðan, 1. deild menn**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 B36 | 9 | 6 | - | 1 | - | 2 | 21 | 7 | 14 | 19 |
| 2 NSÍ | 10 | 5 | - | 4 | - | 1 | 20 | 9 | 11 | 19 |
| 3 HB | 9 | 5 | - | 3 | - | 1 | 22 | 11 | 11 | 18 |
| 4 B68 | 9 | 3 | - | 5 | - | 1 | 8 | 5 | 3 | 14 |
| 5 KÍ | 9 | 4 | - | 2 | - | 3 | 10 | 15 | -5 | 14 |
| 6 EB/Streymur | 9 | 3 | - | 4 | - | 2 | 14 | 14 | 0 | 13 |
| 7 GÍ | 9 | 3 | - | 3 | - | 3 | 12 | 14 | -2 | 12 |
| 8 FS V | 9 | 2 | - | 1 | - | 6 | 10 | 20 | -10 | 7 |
| 9 VB | 9 | 1 | - | 3 | - | 5 | 9 | 18 | -9 | 6 |
| 10 Skála | 10 | 1 | - | 0 | - | 9 | 6 | 19 | -13 | 3 |





*Skótarnir hugna sær á "nordisk lejrbål" - nógv gott undirhald var á kvøldinum*

# Góður hýrur á Selatrað

**Í hesum døgum er ein skótaleiðaralega á Selatrað, har ung fólk úr øllum Norðurlondum luttaka**

SKÓTAR
*Rógvi Borðoy*

Útróður, hornarbeiði, klintrimúrur og síging eru millum mongu aktivitetirnar á Skótaleiðaraleguni á Selatrað. Magni Laksáfoss er leguovasti á leguni, og hann letur sera væl at. Hóast hann hevur verið á nógvum skótalegum gjøgnum tíðirnar, sigur hann, at hendan hevur verið ein tann besta nakrantíð.

- Eg havi ikki upplivað so góðan hýr fyrr, sigur Magni Laksáfoss. Hetta er eitt ótrúligt upplivilsi.

Á stevnuni eru umleið 90 luttakarar, sum allir eru millum 12 og 16 ára gamlir. Haraftrat koma leiðararnir, soleiðis at talið nærkast 150 tá mest er um dagin. Endamálið við stevnuni er undirvísing. At læra skótaleiðarar at gerðast betri.

Magni Laksáfoss sigur, at grundarsteinurin í skótarørsluni er patruljan, og meiningin við leguni er at styrkja hendan grundarsteinin.

### Fólk eru ymisk

- Vit vóru eitt sindur bangin fyri, hvat mundi fara at henda, tá vit gjørdu bólkarnar, tí luttakararnir eru úr ymiskum londum. Men tað hevur gingið sera væl, sigur Magni Laksáfoss, og leggur aftrat, at avbjóðingin akkurát er tann, at fólk eru so ymisk.

Sum dømi nevnir hann, at teir svensku skótarnir eru vanir við tveir heitar rættir hvønn dag, meðan restin av luttakarunum vanliga hava fingið ein um dagin.

Vanliga hevur skótarørslan í Føroyum arbeitt fyri kristnum sjónarmiðum, og vanligt hevur verið at hava eina andakt hvønn morgun. Á leguni ber hetta ikki altíð til, tí fleiri luttakarar eru, sum lýsa seg sum ateistar. Leiðslan fer ikki at noyða nakran at gera nakað, hann ikki vil, so tey hava frí, meðan restin er í kirkju og til andakt.

### Nógv tiltøk

Luttakararnir kunna royna at síga seg oman í ein foss á Selatrað, og tann aktiviteturin hevur verið sera væl vitjaður, sigur Magni Laksáfoss. Men mest vitjaði aktiviteturin hevur tó verið útróðurin. Skótarnir hava ein bát, teir kunna fara á sjógv við, og har kunna teir so royna seg sum fiskarar.

### Mikudagin er liðugt

Skótaleiðaralegan byrjaði mikudagin tann 2. juli og mikudagin tann 9. juli fara tey fyrstu heim. Legan verður annars hildin umleið annað hvørt ár, og londini skiftast um at skipa fyri.



*Hvør torir fara nidur eftir høga fossinum? - Trygdin er í hásæti tá farast skal nidur eftir fossinum*



*Veggurin er 7 m høgur. Hvør klatrar skjótast upp? Rekordin er 13,3 sekund*

# 47.000 til Barnaheimið

**Tann 29. mei varð skipað fyri stuðulstiltaki á Barnaheiminum á P. við Steingøtu. Høvuðsstuðul var ein motorsúkklufelagsskapur, sum eitur Blue Berets**

VÆLGERÐ
*Rógvi Borðoy*

Endamálið við tiltakinum var at savna saman pening til eina ferð hjá búfólkinum á Barnaheiminum. Ove Ritter og Solrun Kristensen samskipaðu innsavningina, og Solrun Kristensen sigur, at tiltakið var sera væleydnað.

Tey høvdu fingið ein motorsúkklufelagsskap, sum eitur Blue Berets, til Føroya í sambandi við tiltakið. Limirnir eru krígsveteranar úr Bosnia, og slíkir felagsskapir skipa ofta sjálvir fyri stuðulstiltøkum. Meiningin var at geva børnunum eina serliga upplivingi.

### Motorsúkklufylgi

Motorsúkklurnar koyrdu í fylgi frá Hotel Føroyum oman á Barnaheimið, har Finnur Helmsdal, leiðari á Barnaheiminum helt røðu. Ove Ritter helt eisini røðu, og síðani var peningurin handaður Barnaheiminum. Búfólkið fekk eisini gávur.

Aftaná tiltakið inni á Barnaheiminum fingu øll búfólkini ein túr á motorsúkklu í Havnini. Hvør túrurin var umleið níggju kilometrar til longdar, og børnunum dámdi sera væl.



*Tiltakið var hildið í fagrasta veðri og børnunum dámdu sera væl motorsúkklurnar*

*Mynd: Jens Kristian Vang*